Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Átøk ímóti harðskapi í býarlívinum

1. Nær verða átøkini í heildarætlanini fyri at basa rúsevnamisnýtslu sett í verk?
2. Eru ætlanir um at seta í verk tiltøk til tess at basa harðskapinum í býarlívinum?
3. Eru nakrar ítøkiligar samráðingar við kommunurnar um átøk ímóti harðskapi?

Viðmerkingar:

Tað gongur neyvan eitt vikuskifti uttan fráboðanir til løgregluna um harðskap í býarlívinum, serliga í miðstaðarøkinum. Harðskapurin tykist gerast grovari og eisini ósek, ung sum eldri, verða álopin. Ógrundaður harðskapur er ein sera álvarsligur trupulleiki, sum hond eigur at verða tikin um beinanvegin. Mynstrið við harðskapi er broytt munandi seinnu árini, og ofta eru rúsevni er ein partur av trupulleikanum. Í mars mánaði varð ein heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnamisnýtslu í Føroyum 2022-2028 handað løgmanni. Tí verða hesir spurningar settir løgmanni.

Á Løgtingi, 26. april 2022

Annika Olsen